## Verkfall á Carlsberg

600 starvsfólk á Carlsberg í Fredericia og Keypmannahavn hava í morgun lagt arbeiðið niður, og tilsamans 1100 kunnu vera á veg til hús. Limirnir í 3F í bryggjarínumhava gjørt av at fara í verkfall, tí boðað er frá, at ongar broytingar verða í lokalavtalunum við samráðingarnar. Starvsfólkið hevur eftir hvat skilst fingið bræv frá leiðsluni sum sigur, at einki pláss verður fyri lønarhækkan í 2010. Tað eru fólk í útkoyringini og framleiðsluni, ið hava lagt arbeiðið niður. Leiðslan í 3F er ovfarin av, at starvsfólk er farið í verkfall, og kendi einki til hetta framman undan. – Carlsberg hevur verið eitt ógvuliga gott arbeiðspláss, men nú verða starvsfólkágóðar skornir burtur, sigur starvsfólkaumboð, Hans Andersen, starvsfólkaumboð við boersen.dk



## Frið fyri pengar

Á einari Afghanistan-ráðstevnu, sum verður í næstu viku, fara USA og Bretland at kunngera, at tey eru til reiðar at brúka pengar til eina ætlan, sum skal fáa limir í Taleban at gevast við stríðnum. Tað sigur afghanski forsetin, Hamid Karzau, í samrøðu við bretska kringvarpið BBC. Hann sigur, at við pengunum er ætlanin at bjóða limum í Taleban arbeiði og trygg viðurskifti, um teir vilja leggja vápnini afturfyri. Karzai sigur tó, at tilboðið umfatar ikki teir mest víðgongdu limirnar í Taleban, al-Qaeda ella øðrum tilsvarandi felagsskapum.

# Jastrid stýrir nú Norðlýsinum

**Blaðið Norðlýsið hevur skift ham, heimasíðan er snøggað, og blaðið hevur fingið nýggjan stjóra**



*Nýggi blaðstjórin, Jastrid Gullaksen, borgarstjórin Gunvá við Keldu, sum áður arbeiddi fleiri ár á Norðlýsinum og John William Joensen, sum hevur skrivað í Norðlýsið í fleiri ár*

BLAÐÚTGÁVA
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*
*myndir: Dávur Winther*

Hópur av fólki var hósdagin til móttøku hjá Norðlýsinum, sum hevur framt fleiri stórar broytingar.

Ein tann størsta broytingin er, at Oliver Joensen er farin frá sum blaðstjóri, og dóttirin Jastrid Gullaksen hevur tikið yvir.

– Pápi mín hevði hug at trappa eitt sindur niður, og vit øll í familjuni hava tosað saman um, hvør skuldi avloysa. Tað endaði í øllum góðum við, at eg skuldi vera stjóri, sigur Jastrid Gullaksen.

Arbeiðið á blaðnum er henni ikki fremmant, tí pápin Oliver Joensen hevur verið stjóri á blaðnum í óminniligar tíðir, og hann eigur sjálvur fyritøkuna.

Beiggi hennara John William hevur eisini í áravís arbeitt á Norðlýsinum, men hann hevði ikki hug at taka evstu ábyrgdina av blaðnum á seg.

Arbeiðsbýtið teirra millum verður nú, at Jastrid umframt at seta blaðið upp, er blaðstjóri og myndar fyritøkuna út eftir, og John William hevur dagligu ábyrgdina av blaðnum.

Oliver Joensen fær nú meira stundir til at skriva og til at taka sær av tiltøkunum hjá Norðlýsinum, ferðunum og Sjómannadegnum.



*Soleiðis kenna fólk flest fráfarna blaðstjóran best*

### Familjufyritøka

Fjórða starvsfólkið í fyritøkuni er Hannefía Joensen, sysir Jastrid. Hann tekur sær mest av at gera lýsingar.

Jastrid sigur, at tey leingi hava tosað um at gera hesar umleggingar, og nú valdu tey at gera tær, samstundis sum blaðið fekk nýtt snið og nýggja heimasíðu. Hon hevur sjálv sniðgivið heimasíðuna, ið Sendistovan hevur gjørt.

Heimasíðan hevur fingið góða móttøku, men onkrar tillagingar skulu tó gerast. Kjakið kemur aftur á heimasíðuna, lovar blaðstjórin.



*Eigil Hentze, sum eina ferð varaði av Norðlýsinum var ein av fleiri, sum handaði Oliver Joensen blómur*

### Tekna haldarar

Seinastu tíðina er blaðið borið út í hvørt hús í økinum, men nú er ætlanin at fara aftur at tekna haldarar og selja blaðið í leysasølu.

– Vit koma ikki uttanum, at blaðið leingi hevur verið at kalla eitt lýsingarblað í Norðoyggjum. Við at hava haldarar verða vit ikki so heft av lýsingainntøkunum, sum vit hava verið, og meira rúm verður til tíðindi, sigur Jastrid.

Heimasíðan fer hereftir at hava styttri útgávur av tíðindunum í blaðnum.

– Norðlýsið verður framvegis eitt lokalblað fyri Norðoyggjar. Vit hava roynt og royna framvegis at fáa eystaru síðu av Eysturoynni uppí, men tað gongur eitt sindur striltið, tí vit hava ongan journalist har. Gongin er annars, at eysturoyingar koma meira og meira henda vegin, sigur Jastrid Gullaksen.